# HEILSANIR



Vit vilja takka øllum tykkum, sum gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 25. okt. 2008. Vit takka fyri gávur, blómur, fjarrit og heilsanir. Takk til tykkum mongu, sum vóru við til at gera dagin hugnaligan og ógloymandi.
**Sigrid og Súni**



Hjartans tøkk til øll tykkum, sum á ymsan hátt gjørdu okkum hátíðardagin ógloymandi.
**Heilsan Sheila og Paul**



**Góði Milan**
Allarbesti lítlibeiggi. Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 1. august. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja Aron**



**Góði Milan**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum 1. august. Eisini ein heilsan til Aron.
**Heilsan omma, abbi, gubbarnir og Flekk**





**Elskaðu Vón og Askur**
Mamma, pabba og Ró ynskja tykkum hjartaliga tillukku á 2 og 5 ára føðingardegnum.

Sosialurin **Heilsanir**

kr. 30,-

## Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur: ____________________________________________

____________________________________________

____________________________________________

____________________________________________

____________________________________________

____________________________________________

____________________________________________

____________________________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ____________________________________________

Bústaður: ____________________________________________

Bygd/býur: ________________________ Tlf.: ____________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: **>>Heilsanir<<**

# MERKISDAGAR

**Brúdleyp**
Leygardagin 8. august giftast Jonna Olsen og Ken Lindenskov Olsen, bæði úr Rituvík. Vígslan verður í Rituvíkar kirkju kl. 10.00. Vælkomst verður heima hjá Beintu og Herbert frá kl. 12.00. Øll eru hjartalig vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 8. august giftast Malan á Dul Vang, Tórshavn, og Páll Nielsen, Trongisvágur. Vígslan verður í Ebenezer kl. 13.00. Eftir vígsluna verður móttøka í lítla sali, har høvi verður at heilsa upp á brúðarparið. Øll eru hjartaliga vælkomin Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 18.00.

**Brúdleyp**
Leygardagin 8. august giftast í Kimmerslev Kirkju, Kamille Rosenfalck, Borup og Gunnleif F. Ellefsen Blaasvær, Tórshavn. Brúdleyp verður fyri innbodnum. Br. adr. Rønnevej 11, 4140 Borup, DK.

**Brúdleyp**
Leygardagin 8. august kl. 14. giftast í Skopunar kirkju Súsanna Hansen, Skopun, og Ove V. Davidsen, Glyvrar. Brúdleypið verður hildið frá kl. 18 við sjálvtøkuborði í heimi okkara, Ognarvegur 5, Skopun. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 7. august kl. 17 giftast í Vesturkirkjuni Dánial Hoydal og Jóhanna Reginsdóttir av Steinum. Veitsla verður um kvøldið fyri innbodnum í Sjónleikarhúsinum í Havn.

**Brúdleyp**
Leygardagin 8. august kl. 15 giftast í Vesturkirkjuni Saloma Vatnhamar Johannesen, Leirvík og Rógvi Ólavsson á Heygum, Tórshavn. Veitslan verður í AB-húsinum eftir kl. 18. Tey ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið, vinarliga sigi frá innan 25. juli á 319986 og 272953.

**Brúdleyp**
Leygardagin 15. august giftast Elin Svínoy úr Runavík og Johnny Festirstein Hansen av Norðoyri. Vígslan verður á Skúlaheiminum við Marknagil kl. 13.00, og eftir vígsluna verður reception. Øll eru hjartaliga vælkomin. Døgurði verður fyri innboðin á Hotel Føroyum.

**Brúdleyp**
Leygardagin 15. august giftast Rannva E. Hammer og Bárur Tindskarð. Víglsan verður í Ebenezer kl. 14 og vælkomst í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19. Tey sum vilja gleða okkum við at koma, kunnu ringja áðrenn 1. august til 581712 (Rannva) ella 275852 (Bárur).

**Brúdleyp**
Leygardagin 15. august giftast Mia Jacobsen, Tórshavn og James Mburu Kagotho, Nakuru, Kenya. Víglsan verður kl. 14 í Filadelfia, Tórshavn. Vælkomst verður í Evangelihúsinum, Tórshavn kl 19. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá innan 1. august til mia_jaz@hotmail.com ella á 319975 (Elin) ella 321099 (Dánjal)

**Brúdleyp**
Leygardagin 5. september giftast Jóhanna Christiansen, Søldarfjørður, og Kriistian Mikkjalsson Joensen, Klaksvík. Vígslan verður í Elim í søldarfirði kl. 13 og veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg á tlf: 288953 ella 216858 áðrenn 22. august.

